# Mentað undirhald



*Pallurin er ógvuliga einfaldur. Munirnar á persónunum síggja vit best sum her, tá Kristina Hansen vísir okkum, hvussu svínoyingar eru*

*Mynd: Jens Kristian Vang*

**Føroyingasøga Grímu style er fyrst og fremst guff fyri ein og hvønn føroyskt ella søgu lærara. Har var ov nógv beinleiðis frásøgn úr kvæðunum, men endamálið at upplýsa um føroyska søgu og sið er rokkið**

UMMÆLI
*Elin á Rógvi*

Tað er ikki undarligt, at Tórgrímur illi vildi hava fatur á ringi Sigmundar. Tí hann var einki minni enn ringurin frá Ringanna Harri, og Sigmundur tann útvaldið. Føroyingasøga sum vit ongantíð hava hoyrt hana áður.

Leygardagin 24. januar hevði Gríma frumsýning av Føroyingasøgu í Gamla Meiarínum í Havn. Salurin var ikki fullsettur, hóast tað var leygarkvøld, og flest øll høvdu frí. Tann føroyska sjúkan við ikki at fara til sjónleik, áðrenn lýst verður við seinastu sýning, hevði aftur gjørt um seg, og tað er spell.

Leikarar vóru Kristina Hansen og Katarina Nolsøe, og leikstjórnað hevði Ria Tórgarð. Tað eru eisini hesar, ið hegnisliga hava evnað nýgjørda leikin til. Men annars er tað ikki serliga nógv nýtt, tí Føroyingasøga gongur fyri seg í víkingatíðini.

Pallurin er minimalistiskur: Alt er svart, og teir einastu rekvisittirnir eru tveir kubbar og tvey træpetti. Hetta minnir í stíli um leikin Søgur úr Krabburð, ið Gríma fyri stuttum sýndi. Og fer man at hugsa, at soleiðis síggja leikir, sum Gríma ferðast við, bara út. Ljósið er somuleiðis einfalt, men eitt sindur meira er gjørt burturúr ljóðeffektunum og tónleiki.

### Lynkursus í søgu

Leikurin, ið er ætlaður børnum frá 10 ára aldri, er innviklaður. Vit fylgja Sigmundi Brestissoni frá vøggu í grøv. Í leikinum er eisini ein ørgrynna av øðrum persónum, ið skulu siga frá sínum luti í stóru heildini. Har er tíbetur ein ættartalva i leikskránni, so tú kanst lúra, um tú ikki ert heilt við. Men lætt er at skyna á, hvør er hvør, tí hvør persónur hevur fingið dialekt ella verðumáta, ið er heilt teirra egni. Kanska kundi enn meira staði í leikskránni um sjálva leikgongdina og teir persónar, ið ikki eru í ættartalvuni. Tað hevði hjálpt áskoðarunum, sum ikki er kvæðakendir. Fyri at ungdómurin kann vera við er neyðugt at tosa og vera eins og tey, og tí eru persónarnir tilvitaðir um, at teir standa á palli í ár 2004, har eru bæði ein Yaris bilur og kodur til Play Station á lofti. Eisini er Ringanna Harri snildisliga knappliga við í søguni. Hetta ger, at leikurin ikki bert er eitt lynkursus í søgu, men serstakliga undirhaldandi. Leikurin er i stóran mun frásøga og eisini beinleiðis frásøgn úr eitt nú Brestiskvæðnum. Tað kann til tíðir verða eitt sindur tungt, men tað er góð javnvág ímillum tyngri partarnar við frásøgn og stuttligaru partarnar við meira spæli.

Føroyskur dansur er við Gnags og Fuglakvæðnum og Týr og Orminum langa vorðin eitt sindur meira inn, og nú tekur Gríma táttin upp. Hesaferð er tað tann góða søgan, ið farið verður eftir, og sum Ria Tórgarð skrivar i leikskránni: felagsupplivingin í dansiringinum. Tey, ið eru góð við dansin, halda kanska, at hann er nokk i sjálvum sær og ikki skal broytast og vendast, men um honum skal verða lív laga er gott, at alt tilfarið í honum verður víst fyri komandi ættarliðum upp á nýggjar mátar. Hetta kann bara økja áhugan bæði fyri søgu okkara og fyri dansinum. Og søgan er góð, eingin ivi um tað, men fløkjaslig.

### Morgunfimleikur

Tvær kvinnur siga frá føroyingasøgu, har menninir hava allar tær kuulu rollirnar, og kvinnurnar sum oftast bara sita og bíða eftir onkrun manni ella gera morgunfimleik. Tað hevði tí kanska verið upplagt við tveimum monnum ístaðin, men hetta hugsar tú ikki um, tí so skjótt leikurin er farin í gongd, ert tú við Sigmundi og Tóra á vandamiklu ferðum teirra.

Hetta er ein krevjandi leikur, og Katarina Nolsøe og Kristina Hansen spæla væl. Ringt er velja okkurt burtur úr, men serliga væl dámdi mær Turið konu Sigmund, ið var sera skemtiligt spæld av Kristinu Hansen.

### Guff

Leikurin er guff hjá einum hvørjum søgu ella føroyskt lærara, nú er møguleiki at støva kvæðini av og finna allar tær góðu søgurnar fram, ið har eru. Lesa og dansa, tulka og greina og so enda við at síggja Føroyingasøgu a la Grímu.

Tað er fyrst og fremst her, at leikurin eigur ein stóran møguleika. Tað er at seta sær høg mál, at fáa ung umvend til kvæði og sjónleik – men so avgjørt ein søk, sum er alla æru verd. Tá tað er sagt, so er Føroyingasøga hjá Grímu ikki ein leikur, tú hugsar um í fleiri dagar, eftir at tú hevur sæð hann, men gott mentað undirhald.



*Katarina Nolsøe og Kristina Hansen eru einsamallar um at siga frá føroyingasøgu. Báðar spæla tær væl í hesum krevjandi leiki*

*Mynd: Jens Kristian Vang*



# Loysir seg illa hjá føroyskum skipum at avreiða uttanlands

**Fyri tað mesta høvdu skipini fingið líka góðan, ella betri prís fyri at avreiða í Føroyum, heldur enn at avreitt uttanlands, vísir ein kanning, sum Ráfiskakeyparafelagið hevur gjørt**

AVREIÐINGAR UTTANLANDS
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*

Sum heild hevur tað ikki loyst seg hjá føroyskum fiskiskipum at avreitt uttanlands.

Tað vísir ein nýggj kanning, sum Ráfiskakeyparafelagið hevur gjørt.

Mangan verður annars sagt, at prísirnir eru nógv betri uttanlands enn í Føroyum, men uppgerðin hjá Ráfiskakeyparafelagnum vísur týðiliga, at verður hugt eftir einum longri tíðarskeiði, er hetta ikki so.

Tað skerst neyvan burtur heldur, at tað eru tær góðu sølurnar, sum fólk minnast best.

Ráfiskakeyparafelagið hevur kannað miðalprísirnar, sum skipini, ið hava avreitt uttanlands, hava fingið fyri fiskin í 10 teir fyrstu mánaðirnar í fjør og samanborið teir við miðalprísirnar í Føroyum.

Agnar Jensen sigur at tølini eru frá Hagstovuni, men at Ráfiskakeyparafelagið hevur gjørt uppgerðina, sum eisini stendur á heimasíðuni hjá Vinnuhúsinum.

Hann sigur, at úrslitið av kanningini er, at eftir landingarprísunum í miðal, loysir tað seg ikki hjá skipum at avreiða so nógv uttanlands, sum tey gera.

Ráfiskakeyparafelagið sigur, at ein uppgerð yvir miðalprísirnar lýsir ikki spurningin til fulnar. Men miðalprísurin vísur prísgongdina eitt ávíst tíðarskeið.

Annars eru tað altíð einstakir túrar, har tað loysir seg betri at avreiða uttanlands, men sum heild hevur tað ikki loyst seg.

Tað sæst eisini á talvunum, at prísurin er nógv meira svingandi uttanlands og at hann er nógv meiri støðugur í Føroyum.

Og samanumtikið staðfestir Ráfiskakeyparafelagið, at niðurstøðan má vera, at ein stórur partur av fiskinum, sum er avreiddur uttanlands, hevði fingið líka góðan, ella betri prís frá føroyskum keyparum, tá ið alt roknistykkið er gjørt upp.

Fyri at lýsa gongdina, hevur Ráfiskakeyparafelagið gjørt nakrar talvur, sum vísa tann prís, sum keyparar í Føroyum og uttanlands, hava latið fyri fisk, sum er avreiddur til ávíkavist føroyskar og útlendskar keyparar.

– Hetta eru avreiðingarprísirnir til skipið. Men tað skal eisini havast í huga, at tað kostar nógv meira fyri eitt fiskiskip at sigla til útlendskar havnir við fiskinum enn at avreiða í Føroyum, higar tað er stutt at sigla.

– Harafturat eru avgreiðslugjøld, sølugjøld og krøv til yvirvekt, vanliga nógv størri í útlondum enn í Føroyum.

– Hesir eyka kostnaðir eru ógvuliga ymiskir, alt eftir, hvørji fiskasløg, talan er um, og hvar skipið avreiðir.

Ráfiskakeyparafelagið sigur, at tí er tað ringt at geva eitt miðaltal fyri, hvussu nógv skal leggjast upp fyri, fyri at kunna samanbera prísirnar í Føroyum og uttanlands.

Men ofta verður mett, at fyri at tað skal loysa seg at avreiða uttanlands, skal prísurin verða einar tríggjar krónur hægri fyri kilo enn í Føroyum.

### Ein triðingur fer av landinum

Annars vísir kanningin hjá Ráfiskakeyparafelagnum, at í tíðarskeiðinum januar til oktober í 2003, eru 30.299 tons av toski, hýsu og upsa farin óvirkað av landinum.

Tað er umleið ein triðingur av tí, sum er fiskað av hesum fiskasløgum.

Tað sum verður útflutt óvirkað, verður partvís avreitt beinleiðis til útlendskar keyparar og partvís verður tað avreitt í Føroyum og síðani útflutt.

Uppgerðin vísur eisini, at av tí toski og teirri hýsu, sum fór óvirkað av landinum frá januar til oktober í fjør, vórðu umleið 60 % avreitt uttanlands og 40% vórðu avreitt í Føroyum og síðani flutt av landinum.

Men hvat hýsu viðvíkur, vórðu meiri enn tveir triðingar avreiddir í Føroyum og síðani fluttir uttanlands og minni enn ein triðingur varð avreiddur uttanlands.

**Feskfiskanøgdir tons jan.- okt. 2003**

| | Veiða | Útflutt heilt | Heilt í % |
|---|---|---|---|
| Toskur | 29.755 | 6.790 | 23 |
| Hýsa | 21.953 | 12.236 | 56 |
| Upsi | 40.060 | 11.273 | 28 |

*Hendan talvan vísur, vísur nógvur fiskur er farin óvirkaður av landinum í tíðini januar til oktober í 2003*

**Feskur heilur fiskur tons jan.- okt. 2003**

| Før. | Útflutt heilt | Avreitt uttanl. | Avreitt í |
|---|---|---|---|
| Toskur | 6.790 | 4.107 | 2.683 |
| Hýsa | 12.236 | 3.531 | 8.705 |
| Upsi | 11.273 | 6.910 | 4.363 |

*Hendan talvan vísur, hvussu nógv av tí fiski, sum feróvirkaður av landinum, er avreiddur uttanlands og, hvussu nógv er avreitt í Føroyum og síðani sent uttanlands*




*Sum tað sæst á talvuni hava miðalprísirnir á toski, sum er avreiddur til føroyskar keyparar, tað mesta av árinum verið hægri enn miðalprísirnir av toski landaðir beinleiðis til útlendskar keyparar. Í Føroyum var prísurin við ársbyrjan einar 17 krónur fyri kilo og uttanlands var hann 14 krónur. Tað er ikki fyrrenn í juni, at miðalprísurin uttanlands fer eitt sindur upp um prísin í Føroyum. Alt fyrra hálvár í fjør, var prísurin í Føroyum væl hægri enn utanlands og ímóti ársenda í fjør var næstan ongin munur.*




*Ovara strikan er prísurin uttanlands. Miðalprísurin á hýsu er meira svingandi uttanlands enn í Føroyum, men í meðal er prísurin á hýsuni, sum er avreidd uttanlands, góðar tríggjar krónur hægri fyri kilo enn í Føroyum. Tríggjar krónur er áleið tað, sum skipini hava av ymsum eyka kostnaði av at avreiða uttanlands.*



*Í Føroyum vilja politikarar treyðugt stuðla alivinnumi, men í Hetlandi verður arbeitt í stórum álvara fyri at hjálpa alivinnuni burturúr trupulleikunum*

# Alivinnuni í Hetlandi fær helst almenna kreppuhjálp

**Eins og í Føroyum er alivinnan í Hetlandi sera illa fyri, men nú verður arbeitt við eini ætlan um at geva henni almennan stuðul**

ALIVINNA
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*

Tað er ikki bara í Føroyum, at alivinnan ekur á knøunum í hesum døgum. Tað ger alivinnan eisini í skotlandi og í Hetlandi, har fleiri alibrúk eru farin av knóranum.

Men ímeðan almennu myndugleikarnir í Føroyum hava verið meiri enn trekir at veita alivinnuni almenna andahjálp, ætla politikarar í Hetlandi ikki at lata standa til.

Nú verður sostatt arbeitt við eini ætlan um at veita alivinnuni í Hetlandi almenna kreppuhjálp.

Ráðahrrin fyri alivinnu í Skotlandi, Allan Wilson, sigur fyri Shetland News í gjár, at arbeitt verður við eini ætlan um at veita alivinnuni almennan stuðul.

Endamálið við hesum stuðuli er at geva bankunum størri trygd, tá ið teir skulu fíggja alivinnuna.

Sami Allan Wilson sigur eisini, at málið verður tikið í størsta álvara og at tað er bráðneyðugt, at bankarnir fáa álit á alivinnuna aftur.

Eftir, hvat skilst, er uppskot frammi um at umskipa ein trygdargrunn, sum veitir trygd fyri lánum til smáídnað, til eisini at umfata alivinnuna.

Hetta hevði gjørt, at tað hevði borið betri til hjá bankunum at fíggja alivinnuna, so at alivinnan kundi líta frameftir, sigur Shetland News.




*Ovara strikan er prísurin uttanlands*
*Tað sæst av myndini at prísirnir eru lækkaðir nógv í árinum. Munurin í millum føroyskar keyparar og útlendskar keyparar er í miðal 0,45. Hetta er nógv minni enn tað, sum tað kostar skipunum av eyka útreiðslum av at sigla uttanlands við fiskinum.*